# Kunngerð um parkering í Tórshavnar kommunu

Sambært § 47, 3. stk. í ferðslulógini verður við samtykki frá vegamyndugleikunum ásett:

§ 1

Bilar, har loyvda totalvektin fer upp um 3.500 kg (lastbilar, vøruvognar og bussar), úrkoplaðar viðfestar vognar og leguvognar, húsvognar, traktorar og motoramboð er ikki loyvt í Tórshavnar kommunu at parkera á gøtu, vegi ella plássi, her uppi í parkeringarpláss, ella á tílíkum støðum, ið opin eru fyri vanligari ferðslu.

Við parkering er at skilja einhvør burturseting av akfari við ella uttan førara. Steðgur, styttri enn 3 minuttir, steðgur, at fara av ella uppá, ella at leggja uppá ella leggja av vørur, kemur tó ikki undir parkering.

**2. stk.:** Undantikin frá forboðnum eru parkeringarpláss, har ið tað við merking er víst, at loyvt er at parkera áðurnevndu akfør.

§ 2

Brot á hesa kunngerð ber við sær, at gjald verður lagt á.

§ 3

Henda kunngerð kemur í gildi við kunngerðina.

**2. stk.:** Samstundis fer kunngerð frá 25. mars 1988 um parkering í Tórshavnar kommunu úr gildi.

**FØROYA LANDFÚTI,**
**Tórshavn, tann 24. januar 2007**
**Karen Marie Olesen**